## Brúktu ikki kvotuna

Íslendsk skip fiskaðu tilsamans góð 36.600 tons av botnfiski í august mánaði. Umleið helmingurin var toskur og hýsa, 8.150 tons av toski og 8.780 tons av hýsu,. Tølini merkja, at fiskimenninir brúktu ikki alla kvotuna seinasta fiskiár, sum endaði nú um mánaðarskiftið. Hjá skipunum vóru fýra prosent eftir og hjá útróðrarbátunum góð sjey prosent ella at kalla tað sama sum næstseinasta fiskiár, skrivar Morgunblaðið. Millum annað lupu góð 15 prosent av hýsukvotuni av, góð 20 prosent av upsakvotuni vóru eftir og somuleiðis knappliga 13 prosent av svartkalvakvotuni.



## Donsk alduorkuverkætlan

Í dag varð farið undir eina stóra verkætlan við alduorku í danska býnum Hanstholm. Ætlanin hevur fingið heitið Danish Wave Center, og gongst sum stigtakararnir ætlað, verður Hanstholm evropeiskur miðdepil á alduorkuøkinum um eini fimm til tíggju ár. Britta Vang Mikkelsen, havnarstjóri, sigur við danska kringvarpið, at verkætlanin fer at skapa nógv førleikakrevjandi arbeiðspláss í býnum, og hon væntar, at verkætlanin fer at seta Hanstholm á heimskortið. Í fyrsta umfari skulu 40 milliónir krónur brúkast til ein bygning og ymsa tekniska útgerð.

# 850 til barnadag á Svangaskarði

**Hóast veðrið ikki var av tí besta, hugnaðu 700 børn og 150 pedagogar og hjálparfólk sær á Svangaskarði í gjár**

BARNADAGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hetta er fimta árið á rað, at B68 skipar fyri barnadøgum á Svangaskarði.

Daguin er fyri børn í barnagarði og í frítíðarskúla og eru tey í aldrinum frá trý til átta ár.

Tiltakið hevur fingið størri og størri undirtøku, og í ár vóru ikki færri enn 700 børn savnað á Svangaskarði. Hartil vóru pedagogar og hjálparfólk frá barnagørðunum kring landið við, umframt tey hjálparfólkini, sum B68 stillaði við.

Veðrið var ikki av tí besta. Væl av vindi var longu frá morgunstundini av, men tá var kortini turt. Út móti miðdegi fór hann tó at regna eisini, og tað gjørdist heldur ófýsið.

Børnini hugnaðu sær kortini við ymsum ítróttaligum spølum á graslíkisvøllinum fram til klokkan hálvgum trý, tá dagurin endaði við stóra brakinum á grasvøllinum. Og tað var ikki eiti á endabrestur.

Trøllapætur og omman undirhildi, og tað fall í serstakliga góða jørð hjá børnunum, sum veruliga vóru við og livdu seg inn í løtuna. Eisini rungaði sangurin um vøllin, har Føroyar fáar dagar framman undan høvdu lagt Litava á lærið.

Hóast veðrið sum nevnt ikki var av tí besta, var tað eingin vandi, tí øll vóru fyrireikað upp á regn og høvdu tí hóskandi klæðir við. So tað vóru vælnøgd børn, sum fóru aftur í bussarnar á veg heim til hús eftir ein vátan, men kortini góðan dag á Svangaskarði.



*850 børn og vaksin vóru savnað á Svangaskarði í gjár til barnaítróttadag*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Tað var sakin, tá Trøllapætur og omman endaðu ein góðan, um enn vátan barnadag*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stóra Bretland og Danmark eru mest eftirspurd

**Mest eftirspurdu lestrarplássini eru framvegis í Danmark og Stóra Bretlandi, har stórur vøkstur hevur verið seinastu árini. Um 600 fólk vitjaðu Markleys Útbúgving í Norðurlandahúsinum í gjár**

ÚTBÚGVING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Stóru árgangirnir úr fyrst í 90'unum eru nú komnir upp í tann aldur, at tey eisini skulu byrja at kunna seg um møguleikarnar fyri víðari lestri. Fyrrapartin í gjár vitjaðu um 500 næmingar úr 9.- og 10.flokkunum kring landið, tá árliga tiltakið Markleys Útbúgving var hildið í Norðurlandahúsinum.

Holger Arnbjerg er fyriskipari av tiltakinum.

- Tað gekk orduliga væl. Her vóru um 500 næmingar fyrrapartin, og um kvøldið vitjaðu okkurt um 100 fólk, sum ikki høvdu møguleikan fyri at vera við fyrr um dagin, tá tey ganga í student ella arbeiða.

Hann greiðir eisini frá, at tað, sum fólkini serliga spyrja um, eru hvørjir møguleikarnir hjá teimum eru fyri at lesa víðari, hvussu man kann seta útbúgvingarnar saman, hvørji krøvini eru og so framvegis.

### Stórur áhugi í Stóra Bretlandi

Gamalt var, at føroyingar at kalla bara fóru til Danmarkar at lesa. Hetta er enn galdandi í høvuðsheitum og í dag lesa um 900 føroyingar í Danmark. Men seinnu árini eru fleiri broytingar at hóma.

- Tekur tú Bretland fyri bara 6 -7 árum síðani, so vóru um 30 lesandi har. Nú haldi eg tað eru um 130 føroysk lesandi har. Eisini í USA eru tað upp móti eini 20 fólk, sum lesa og í Póllandi eru tað 10 ella 11 føroyingar, sum lesa til lækna, greiðir Holger Arnbjerg frá.

Undanfarin ár hevur Markleys Útbúgving verið hildið úti á skúlunum, síðani umborð á Smyrli, og nú tiltakið er vorðið so stórt, er tað flutt í Norðurlandahúsið, har Holger Arnbjerg lýsir umstøðurnar sum framúrskarandi til hetta endamálið.



*Holger Arnbjerg, fyriskipari av Markleys Útbúgving, staðfestir, at hóast Danmark enn er tað staðið, har flestu føroyingar fara at lesa, so eru stórar broytingar at hóma, eitt nú velja alsamt fleiri at fara til Stóra Bretland og USA at lesa*

*Savnsmynd*